# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar



*1. november fingu Súsan og Bjarni Joensen, Viby Sjælland, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3180 gr.*



*17. oktober fingu Katrin Arge og Jákup í Dali, Argjum, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3400 gr.*

13. oktober fingu Beinta Johannessen og Martin Meng, Nýkøbing F., eina dóttur. Hon vigaði 3400 gr. og var 52 cm long.

17. oktober fingu Ranvá Jacobsen og Ove Nysted, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3300 gr.

28. oktober fingu Gunnvá og Esmar Müller, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3600 gr.

28. oktober fingu Ann og Hans Hammer, Ljósá, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3050 gr.

30. oktober fingu Sissal Justinussen og Svend Vatnsdal, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3150 gr.

30. oktober fingu Anita T. og Karl Johannesen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3300 gr.

31. oktober fingu Bárður Sandá, Vági, og Christine Brust, Svendborg, eina dóttur, sum eitur Freja. Hon var 53 cm long og vigaði 3900 gr.

31. oktober fingu Miriam og Magnus Joensen, Klaksvík, tvíburðar, dreingir. Annar var 47 cm langur og vigaði 2490 gr, og hin 48 cm langur og vigaði 2615 gr.

31. oktober fingu Ingun Eidesgaard og Hermann Mortensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4150 gr.

1. november fingu Annika og Esben Kousholt, Odense, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4491 gr.

1. november fingu Ásbjørg E. Thomsen og Palle Dam Nielsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 48 cm long og vigaði 2500 gr.

2. november fingu Elsa og Fróði Thorkildshøj, Hoyvík tvíburðar – gentur. Onnur vigaði 2350 gr og var 48 cm long og hin vigaði 2600 gr og var 49 cm long.

5. november fingu Elisabeth og Jón Thomasen, Kvívík tvíburðar – gentu og drong. Gentan vigaði 2250 ge og var 48 cm long og drongurin vigaði 2900 gr og var 50 cm langur.

Sp/f Bil Mini-Taxi:

## André og Annie Guttesen vunnu ferðaseðilin




*André Guttesen saman við bilføraranum, Andrias R. Samuelsen, sum koyrdi hýruvognin vinnaratúrin.*

*Mynd: Andreas G. Johansen*

**Síðan 14. september 2004 hevur Sp/f Bil Mini-Taxi skipað fyri eini kapping, har kundi nr. 2500 vinnur ein Apex-ferðaseðil við Atlantic Airways. Sunnudagin 31. oktober vóru Annie og André Guttesen í Havn hepnu vinnararnir**

Tá Annie og André Guttesen á Suðuroyarvegi 10 í Havn, sunnudagin 31. oktober fyrrapart, ringdu eftir hýruvogni frá bilstøðini Bil Mini-Taxi, fingu tey at vita frá bilføraranum Andrias R. Samuelsen, at tey høvdu vunnið ein Apex-ferðaseðil frá Atlantic Airways. Annie fór av á Vaglinum, og André skuldi oman á Farstøðina.

Orsøkin var, at tey vóru kundi nr. 2500 hjá Sp/f Bil Mini-Taxi.

Hetta var annar vinningur síðan kappingin byrjaði. Fyrsti vinnarin var Suni Bjartalíð í Klaksvík.

Talan er bert um innringdar túrar, ella har fólk koma á støðina og biðja um hýruvogn.

Við í vinninginum er koyring til og frá Flogvøllinum, um vinnarin býr har sum koyrandi er til.

Kappingin endar 14. november, so møguliga verður onkur vinnari afturat til tað tíð.

## Bíligari olja men verri kappingarføri móti USA

TÍÐINDASKRIV
*www.sparikassin.fo*

Búskaparfrøðingur í Sparikassanum metir, at viknaði dollarin hevur eina avmarkaða ávirkan á føroyska búskapin.

Ein av spurningunum, ið taka seg upp í kjalarvørrinum av tí veika dollaranum, er, hvørjar avleiðingarnar munnu verða fyri føroyska búskapin.

Johnny í Grótinum, sum er búskaparfrøðingur og starvast á fíggjardeildini hjá Føroya Sparikassa í Havn, metir, at viknaði dollarin hevur avmarkaða ávirkan á føroyska búskapin:

"Ávirkanin í Føroyum er í tveimum. Oljan gerst helst nakað bíligari, og tað man hava fyrimunir við sær fyri tey flestu. Hinvegin verður prísurin verri fyri tær útflutningsvørur, ið kappast við amerikanskar fyritøkur. Tað er galdandi fyri summar av okkara fiskavørum", sigur Johnny í Grótinum.

Hann vísir tó á, at føryski útflutningurin, ið fer beinleiðis á amerikanska marknaðin, er avmarkaður.

## Eydnuhjól í Miðvági

TÍÐINDASKRIV

Aftur í ár skipar Áhugafelagið hjá MB fyri eydnuhjóli. Peningurin ið kemur inn, fer til viðlíkahald av MB-húsinum og graslíkisvøllinum.

Eydnuhólið verður sunnudagin 7. november í Bygdaskúlanum, og tað byrjar kl. 18.00. Lutaseðlar verða eisini seldir, har m.a. 500 litrar av olju eru at vinna, og fleiri aðrir góðir lutir.

Eisini verður høvi at keypa sær ein kaffimunn og køku afturvið.

## Andlát

29. oktober
Niels Fløtt, Klaksvík, 88 ár.

30. oktober
Leivur Andreassen, vanliga nevndur Leivur í Ullvøruhúsinum, 81 ár.

1. november
Jóhanna Durhuus, ættað úr Trongisvági, búsitandi í Vestmanna, 75 ár.

2. november
Knud Peder Jensen, fyrrverandi stjóri á Vestmanna Skipasmiðju, 84 ár.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Ingibjørg og Poul Nolsøe Mikkelsen gullbrúdleyp



Í dag, leygardagin 6. november, eru 50 ár síðani, at Ingibjørg og Poul Nolsøe Mikkelsen í Klaksvík gingu saman í hjúnarlag. Dagurin verður hildin hjá dóttrini á Argjum, har tað er høvi at hitta gullbrúðarparið frá klokkan fýra seinnapartin.

Ingibjørg og Poul Nolsøe ella Nøddi, sum hann altíð hevur verið nevndur, hava bæði røtur í Heimistovu. Hon er ættað úr Heimistovu í Svínoy og næstyngst av teimum sjey børnunum hjá Annu og Jóannesi bónda. Foreldrini vóru bæði úr Svínoy. Pápi Nødda, Jákup Mikkelsen, var ættaður úr Heimistovu á Uppsølum í Klaksvík. Kona hansara var Cathrina, sum var ættað úr Glasstovuni í Árnafirði. Tey búsettust á Vágsheygnum, og Nøddi er næstyngstur av ellivu systkjum.

Ingibjørg og Nøddi giftust inn í barnaheimið hjá honum, og har búgva tey framvegis. Nógv fólk hevur vitjað, og tey eru mong, sum hava ligið nátt á Vágsheygnum, har gestablídnið altíð hevur verið ógvuliga stórt.

Nøddi hevur alla sína tíð verið sjómaður. Hann hevur róð nógv út við útróðrarbátum av Vánni, og framvegis er Nøddi, sum er føddur 23. september í 1927, egnari hjá Háenni. Onkur skifti hevur hann verið við línubátum. Eitt nú var hann við Jógvani S og Klakki. Tá ið hann var yngri, dámdi Nødda sera væl at fáast við seyð.

Frítíðarítrivini hjá Nødda hava verið tvey. Annað er í Borðoyarvík, har honum dámar so stak væl at vera, og har hann framvegis ofta er á floti. Hitt er fótbólturin. Tað lá væl fyri hjá Heimistovu beiggjunum í fótbólti. Sofus var tiltikin, og Emil var á fyrsta meistaraliðnum hjá KÍ í 1942. Nøddi var á liðnum, sum vann meistaraskapin í meistaradeildini í 1952. Evnini vóru góð, men hann noyddist tíðliga at gevast at spæla. Áhuganum fyri fótbóltinum hevur hann ongantíð slept. Tað er stutt av Vágsheygnum og á plenuna, og Nøddi sær heimadystirnar hjá KÍ í øllum deildunum, og tá ið tað liggur fyri, fylgir hann við í venjingunum.

Ingibjørg, sum er fødd 7. november í 1931, var hjá Odu Kjølbro, tá ið hon sum blaðung kom úr Svínoy og til Klaksvíkar. Seinni arbeiddi hon í køkinum á Sjúkrahúsinum,. Meðan børnini vóru smá, var hon, sum flestu aðrar konur tá í tíðini, heimaarbeiðandi. Tá ið børnini vóru undankomin, var hon í nógv ár væl dámd dagrøktarmamma. Ingibjørg luttekur í nógvum sosialum felagslívi, um tað so er at fara á bingo, at hittast í pensionistafelagnum Hugna og Klaksvíkar Húsmøðrafelag ella í bindiklubbanum.

Ingibjørg og Nøddi eiga fýra børn. Anna býr í Syðrugøtu, Jórun býr á Argjum, Jónfríð býr í Haslev, og Jákup, ið er kendur sum málverji á landsliðnum, flutti fyri einum ári síðani aftur til Klaksvíkar, eftir at hann í níggju ár hevði búð uttanlands. Barnabørnini eru fimtan, og í triðja ættarliðnum eru tvey komin.

## Stuðlið okkum at fáa norðurlendskt sjónvarpstilfar

**Norðurlandaráðslimurin, Óli Breckmann, vónar, at norðurlendskar sjónvarpsrásir fara at vísa samstarvsvilja, tá føroyska sjónvarpið í næstum fer at royna at fáa tvílanda avtalur við norðurlendskar rásir**

NORÐURLANDARÁÐSFUNDUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*– Norðurlendsk mentan og mál hava tað gott, men tað má ikki gerast ein koddi. Vit eiga at leggja nógv fyri at styrkja okkara felags norðurlendska samleika, segði Óli Breckmann millum annað.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Skattur og harðkókaður fíggjarpolitikkur er skiftur út við bleytan mentanarpolitikk. Ikki kann sigast annað enn at Óli Breckmann roynir nýggjar leiðir, eftir at hann hevur fingið sætið í Norðurlandaráðnum.

Í farnu viku var hann saman við hinum føroyska norðurlandaráðsliminum, Kára P. Højgaard, í Stokkhólmi á árliga Norðurlandaráðsfundinum.

Eitt evnið á dagskránni var sambandið millum norðurlendskt sjónvarp og mentan. Óli Breckmann vísti undir hesum orðaskifti á, at hann metti, at norðurlendska mentanarlívið hevði tað gott í løtuni, men at vit eiga kortini at vera á varðhaldi.

– Norðurlendsk mentan og mál hava tað gott, men tað má ikki gerast ein koddi. Vit eiga at leggja nógv fyri at styrkja okkara felags norðurlendska samleika, segði Óli Breckmann millum annað.

### Stuðlið okkum

Óli Breckmann greiddi eisini frá, at norðurlendskt sjónvarp hevur ein ómetaliga týdningarmiklan leiklut í strembanini hjá norðurlendingum at styrkja norðurlendska samleikan.

– Eg vóni tí, at limirnir í norðurlandaráðnum fara at stuðla føroyska landsstýrinum og føroyska sjónvarpinum í teirra stremban eftir at fáa tvílanda samstarv við norðurlendskar sjónvarpsrásir, so møguleiki verður fyri at býta um sjónvarpsendingar, segði Óli Breckmann millum annað undir orðaskiftinum.

Hann legði afturat, at skal norðurlendskt tilfar framvegis hava munin á øðrum tilfar er eitt samstarv millum norðurlendsku sjónvarpsrásirnar avgerandi.

– Ein slík avtala kundi varðveitt føroysku festið í norðurlendskum máli og mentan. Í hesum sambandi hevði ein felags norðurlendsk barnarás verið hent, og eg skal leggja afturat, at Føroyar framvegis stuðlar royndini í at gera eitt felags norðurlendskt grannasjónvarp, vísti Óli Breckmann á.




## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum gleddu meg á 95 ára føðingardegnum 21. oktober.

**Martha Matras**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu tá góða omma og langomma okkara

**Eva Petronella Næss**

doyði og varð jarðað.
Tøkk fyri hjálpsemi í samband við andlát og jarðarferð.
Tøkk fyri gávur, blómur og kransar, og til tykkum øll, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*

**Edna og Johnny v/ familju**
**Frida og Kári**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu við deyða og jarðarferð hjá

**Bethuel Zachariasen**

Klaksvík

*Vegna tey avvarðandi*

**Solborg**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið á ymiskan hátt sýndu samkenslu tá okkara kæri maður, pápi, abbi, langabbi og verfaðir

**Carl Herup Olsen**
**Tórshavn**

andaðist og fór til gravar.

Tøkk fyri blómur, kransar og annars alla hjálp og tænastu, ið veitt varð.

**Anna**
**Ólavur, Jóngerð, Regin, Randi og Jósvein**